VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið.

Tórshavn, tann 21. januar 2015
Vmr. J.Nr.: 15/00057

Viðgjørt: SPS

**Løgtingsmál nr. /2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (Broyting av bíðidøgum, leingjan av karenstíð, leingjan av undanfarna skeiði, arbeiðsmarknaðarátøk.)**

# *Uppskot*

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (Broyting av bíðidøgum, leingjan av karenstíð, leingjan av undanfarna skeiði, arbeiðsmarknaðarátøk)**

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 46 frá 17. mai 2011 og løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 8 stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Tryggingartakarin kann í mesta lagi rinda ALS-gjald av kr. 650.000 samsvarandi ásetingunum í § 9.”

2) Í § 14 stk. 1 verður sum nýtt nr. 6, sett:
“6) er sinnaður at luttaka í arbeiðsmark-naðarátøkum, sbr. §§ 25-25 b”

3) Í § 16 a verður sum nýtt stk. 2 sett:
*Stk. 2.* Mynstrar persónur, sum fær útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini, við skipi, og mynstringin er styttri enn ein mánað, verður ikki roknað við bíðidøgum.” Stk. 2 verður síðani stk. 3, og stk. 3 verður stk. 4.

§ 16 a verður orðað soleiðis:
”**§ 16 a.** Arbeiðsloysisstuðul verður ikki goldin, fyrr enn teir í stk. 2 nevndu bíðidagar eru farnir.
*Stk. 2.* Er útrokningargrundarlagið sambært § 15 kr. 250.000 ella minni, verða tveir bíðidagar roknaðir. Fyri hvørjar heilar kr. 100.000 útrokningar grundarlagið hækkar, hækka bíðidagarnir við tveimum bíðidøgum.
*Stk. 3.* Mynstrar persónur, sum fær útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini, við skipi, og mynstringin er styttri enn ein mánað, verður ikki roknað við bíðidøgum.
*Stk. 4.* Roknast kunnu í mesta lagi 10 bíðidagar.”

4) Í § 18 verður ”4 vikur” broytt til: ”8 vikur”.

5) § 19, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at luttaka í arbeiðsmarknaðarátaki, sbr. §§ 25 - 25 b, ella at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul, sbr. tó pkt. 2. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, sum nevnt í pkt 1, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir at rokna frá degnum eftir, at fráboðanin um luttøku í arbeiðsmarknaðarátaki má roknast við at vera móttikið av tí arbeiðsleysa."

6) Í § 19 a verður stk. 2 strikað, og stk. 3, verður síðani stk. 2.

7) Í § 21 verður eftir stk. 3 sett:

Stk. 4. Ásetingarnar í stk. 1 – 3 verða ikki nýttar, um arbeiðsloysið er undir 6%."

8) Í § 22, stk. 1 verður "3-ára skeiði" broytt til: "4-ára skeiði".

9) Yvirskriftin áðrenn § 24 "Kapittul 6 Arbeiðsávísing og arbeiðsskapandi tiltøk" verður broytt til: "Kapittul 6 Arbeiðsávísing og arbeiðsmarknaðarátøk".

10) § 25 verður orðað soleiðis

"§ 25. Persóni, sum er arbeiðsleysur, kann verða álagt at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, sbr. stk. 3 og 4, og §§ 25 a og 25 b.
Stk. 2. Arbeiðsmarknaðarátøk skulu styrkja og menna hin einstaka og økja um møguleikarnar fyri at koma aftur í arbeiði.
Stk. 3. Arbeiðsmarknaðarátøk eru m.a.:
1) samrøður.
2) lønt starvsvenjing, sbr. §§ 25 b
3) ALS farloyvi, sbr § 25 a
4) ólønt starvsvenjing,
5) skeið og førleikagevandi tiltøk..
6) arbeiðsgevaravitjanir,
7) samfelagsgagnligar verkætlanir.
8) útbúgvingar styttri enn 3 mánaðir.
Stk. 4. Nærri reglur um arbeiðsmarknaðarátøk verða ásettar í kunngerð frá landsstýrismanninum, og eftir góðkenning frá stýrinum fyri ALS, heruppií reglur um innihald, persónskara, skipan av átøkunum, nær og undir hvørjum treytum ein persónur skal luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkunum o.a.

11) Eftir § 25 verður sett:

§ 25 a. Um stýrið tekur undir við ásetingunum, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð nærri reglur um útgjaldingar til fólk í farloyvi frá føstum ella støðugum starvi, herundir at útgjaldið kann vera lægri, enn ásett í § 15 og § 16, hvørjar treytir skulu setast tí, ið fer í farloyvi, og tí arbeiðsleysa, m.a. hvussu tann, ið fer í farloyvi, skal skrásetast í arbeiðsávísingini, hvussu leingi hin arbeiðsleysi skal hava fingið stuðul, umframt nærri reglur um, nær talan er um fast ella støðugt starv, o. l.
Stk. 2. Útgjald undir farloyvi kann verða givið fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 12 mánaðir.
Stk. 3. Útgjald undir farloyvi skal verða givið við teirri treyt, at annað fólk, sum fær arbeiðsloysisstuðul og er tøkt í arbeiðsávísingini, verður sett í staðin í sama tíðarskeiði og í høvuðsheitum undir somu treytum.

§ 25 b. Fyri átøk viðvíkjandi arbeiðsvenjingum hjá privatum og/ella almennum arbeiðsgevarum, ásetir landsstýrismaðurinum í kunngerð eftir góðkenning frá stýrinum hjá ALS reglur um, undir hvørjum treytum Arbeiðsloysisskipanin í sambandi við slík tiltøk endurrindar arbeiðsgevaranum tann stuðul, hin arbeiðsleysi annars hevði havt rætt til, og møguligar aðrar útreiðslur.

**§ 2**

Henda løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá 13. Juni 2015.

*Stk. 2.* Undanfarna skeiðið, sum ásett í § 1, nr. 8, verður longt við einum útgjaldsskeiði fyri hvørt útgjaldsskeið í eitt ár".

## Viðmerkingar til lógaruppskotið

### Kap. 1. Almennar viðmerkingar

### 1. Endamálið við lógini

Uppskotið byggir á uppskot frá stýrinum fyri ALS, og endamálið við lógini er tvíbýtt. Annað endamálið hevur støði í búskaparligu viðurskiftunum hjá ALS og at tryggja langtíðarhaldførið hjá Arbeiðsloysisskipanini. Hitt endamálið er at seta greiðari ásetingar í lógina um at bøta møguleikarnar hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og hjá føroyskum arbeiðsgevarum at fáa skikkaða arbeiðsmegi.

Uppskotið er sama uppskot, sum varð lagt fyri Tingið seinasta heyst, løgtingsmál nr. 36/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (Broyting av bíðidøgum, leingjan av karenstíð, leingjan av undanfarna skeiði o.a.).

Í mun til tað uppskotið, eru hesar broytingar gjørdar í hesum uppskotinum:

- Farloyvisskipanin verður ikki tikin av, sum skotið varð upp, tó verður farloyvisskipanin eftir uppskotinum bert nýtt, um arbeiðsloysið er omanfyri 6%.
- Arbeiðsmarknaðarátøk. Greiðari ásetingar um tey tiltøk, sum ALS kann seta í verk til tess at bøta um møguleikarnar hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og hjá føroyskum arbeiðsgevarum at fáa skikkaða arbeiðsmegi, nevnd arbeiðsmarknaðarátøk.
- Hugtakið "tøkur" verður víðkað til eisini at umfata virkna luttøku í arbeiðsmarknaðar-átøkum.
- Ásetan av staðiligari heimild í lógini at seta krav um, at arbeiðsleys hava skyldu at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, og staðiliga heimild í lógini at geva karantenu til arbeiðsleys, sum ikki eru sinnað at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum.

### Tryggja búskaparliga haldførið

Eftir eitt langt tíðarskeið við fallandi arbeiðsloysi og vaksandi eginogn varð løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin) broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009 (Lm. nr. 179/2008), og gjørdust sømdirnar hjá arbeiðsleysum tá munandi betri.

Tá arbeiðsloysið um ársskiftið 2010/2011 av álvara fór at vaksa aftur, hækkaðu samlaðu útgjøldini nógv. Millum annað orsakað av betringunum, sum vórðu framdar í 2009, og trýstið á Arbeiðsloysisskipanina øktist munandi, og hallið vaks.

Staðfestast kann, at frá 2010 til 2013, t.v.s. eftir bara fýra árum, hevur Arbeiðsloysisskipanin havt eitt samlað hall, sum táttar í 400 mió. krónur. Av somu orsøk er eginognin minkað úr nærum 750 mió. krónum, tá hon var størst miðskeiðis í 2009, til stívliga 300 mió. krónur við árslok í 2013.

Arbeiðsloysið í Føroyum er lágt. Tað minkaði í 2014, og var við árslok beint omanfyri 3%. Hóast lága arbeiðsloysið, so er úrslitið hjá ALS ikki nøktandi, og við verandi regluverki (ALS-lógini og kunngerðum til lógina) er skipanin ikki haldfør í longdini.

Búskaparliga gongdin hjá skipanini hevur verið so álvarsom, at tað verður mett bráðneyðugt at fáa skipanina á beint aftur.

Í 2012 vórðu fleiri broytingar gjørdar at venda álvarsligu búskaparligu gongdini. Ein broyting varð framd við løgtingslóg nr. 45 frá 8. mai 2012 (Lm. 155/2011), har arbeiðsloysistuðulin var skerdur, og 10 bíðidagar vóru innførdir.

Henda lógarbroyting varð framd í 2012.

Tørvur er nú á at gera aðrar tillagingar í regluverkinum fyri Arbeiðsloysisskipanina soleiðis, at skipanin í longdini kann verða fíggjarliga haldfør.

Tær tillagingar hava støði í søguliga arbeiðsloysinum, og eftir uppskotinum verður skipanin tillagað soleiðis, at tá arbeiðsloysið er lægri enn 4,25-4,50%, skal Arbeiðsloysisskipanin hava avlop og verða styrkt fíggjarliga, meðan skipanin hevur hall, tá arbeiðsloysið er omanfyri 4,5%.

Markið á 4,25% til 4,50% er á leið miðal arbeiðsloysið frá byrjan í 1992 til og við 2013, leiðrættað fyri tíðarskeið, tá arbeiðsloysið hevur verið óvanliga høgt ella lágt.

Við støði í málinum um, at skipanin skal hava avlop, so leingi arbeiðsloysið er niðanfyri 4,25-4,50%, er neyðugt at betra árliga raksturin við millum 15 og 30 mió. krónum.

Fyrsta stig at tillaga skipanina verður tikið við tiltøkum í lógaruppskotinum, sum útvega Arbeiðsloysisskipanini millum 16,7 og 17,2 mió. kr

Eftir uppskotinum hækka inntøkurnar nakað, við at inngjaldshámarkið verður sett upp soleiðis, at ALS-gjald eftir broytingina nú verður goldið av inntøkum upp til 650 tús. krónur.

Harafturat minka útgjøldini tí at áramálið, sum útgjaldsdagarnir verða upptaldir, verður longt úr trimum upp í fýra ár, og at karantena fyri at siga seg úr starvi ella verða burturvíst/ur verður økt úr fýra upp í átta vikur.

Tað hevur eisini týdning, at eftir uppskotinum verða bíðidagarnir tengdir at inntøkum, sum gongur frá tveimum upp í 10 bíðidagar. Mett verður, at hesar broytingar í bíðidøgunum fara at stimbra hugin og møguleikarnar hjá fólki at koma aftur í arbeiði.

**Arbeiðsmarknaðarátøk**
Eitt av endamálunum við hesi lógarbroyting er at seta greiðari ásetingar í lógina um átøk at bøta um møguleikarnar hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði, og hjá føroyskum arbeiðsgevarum at fáa skikkaða arbeiðsmegi, umframt at áseta staðiliga heimild í lógina at áleggja arbeiðsleysum skyldu at luttkaka í hesum tiltøkum, og at áleggja karensdagar, um álagda skyldan ikki verður hildin.

**Galdandi reglur**
Eftir § 1, stk. 1 í lógini hevur arbeiðsloysisskipanin til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin.

*Arbeiðsloysistuðul*
Eitt grundleggjandi krav fyri at hava rætt til arbeisloysistuðul er, at tann arbeiðsleysi er tøkur og arbeiðsførur at átaka sær eitt og hvørt fulltíðarstarv á arbeiðsmarknaðinum. Hetta kravið er ásett í § 14, stk. 1, nr. 2 í lógini.

Nærri reglur um kravið at vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum eru ásettar í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysstuðli, m.a.:

- at tann arbeiðsleysi er sinnaður at átaka sær eitt og hvørt arbeiði, ávíst av Arbeiðsloysisskipanini, og sum viðkomandi hevur fakligan førleika til,
- er skrásettur í arbeiðsávísingini,
- í rímiligan mun er arbeiðssøkjandi, og eftir umbøn frá Arbeiðsloysisskipanini kann prógva, at viðkomandi søkir arbeiði, sum eru leys at søkja,
- seinast dagin eftir, um boð verða givin um hetta, kann møta hjá Arbeiðsloysisskipanini til ásetta tíð,
- ikki er undir útbúgving í vanligari arbeiðstíð.

Avleiðingin av at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av Arbeiðsloysisskipanini, er eftir § 19 í lógini, at tann arbeiðsleysi missir rættin til arbeiðsloysisstuðul. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir.

**Førleikagevandi tiltøk**
Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing var í § 26 (nú § 25) ein avmarkað heimild til í serligum førum at seta í verk og gjalda førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys.

Í viðmerkingunum til ásetingina í § 26 í uppskotinum til høvuðslógina, løgtingsmál nr. 99/1996 : Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, Løgtingstíðindi 1996 s. 668, varð sagt:

"*Stýrið kann í serligum førum seta í verk og gjalda førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys. Hetta kann til dømis verða í sambandi við fyrireikan til eina komandi møguliga oljuvinnu".*

Við løgtingslóg 79 frá 25. mai 2009 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing vórðu heimildirmar at seta í verk førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys víðkaðar m.a. soleiðis, at skipanir við arbeiðsvenjingum hjá privatum og/ella almennum arbeiðsgevarum, har Arbeiðsloysisskipanin endurrindar arbeiðsgevaranum, kunnu setast í verk. Við hesi heimild er skipanin við starvsvenjing sett í verk.

*Farloyvisskipan.* Umframt tað meira generellu heimildina í § 25 at seta í verk førleikagevandi tiltøk og starvsvenjing, er ein serlig heimild til at seta í verk eina farloyvisskipan í § 21, har arbeiðsleys kunnu fáa starv fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 12 mánaðir fyri ein, sum fer í farloyvi. Tann arbeiðsleysi verður settur við somu treytum, sum tann, ið fer í farloyvi, hevði, meðan tann, sum fer í farloyvi, fær útgjald frá ALS. Nærri reglur um farloyvisskipan eru ásettar í kunngerð um útgjald av farloyvisstuðuli.

Samanumtikið: ALS hevur síðani stovnan skipað fyri ávísum førleikagevandi tiltøkum fyri arbeiðsleysum, t.e. skeiðum o.a. Hesi tiltøk hava verið avmarkað og hava verið eitt tilboð til arbeiðsleys.

Førleikagevandi tiltøkini fyri arbeiðsleys eru økt munandi, og ALS krevur nú, at arbeiðstøk luttaka í førleikagevandi tiltøkunum, og avleiðingin av at nokta at luttaka er sambært lógini, at viðkomandi missir arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir.

ALS er í stóran mun ein heimildarlóg, sum ásetir yvirskipaðu karmarnar fyri ALS, um m.a.leiðslu-, fíggjar, - roknskaparviðurskifti, um inn- og útgjald, um treytir fyri útgjaldi, um arbeiðsávísing og førleikagevandi tiltøk, kærur, revsing, meðan tað í lógini verður heimilað fyrisitingarliga at áseta nærri reglur viðvíkjandi nevndu viðurskiftum.

Heimildirnar í løgtingslógini um arbeiðsloysisstrygging og arbeiðsávísing at áleggja arbeiðsleysum skyldu at luttaka í førleikagevandi tiltøkum og áleggja karensdagar, um arbeiðsleys ikki halda áløgdu skyldurnar, eru ikki greiðar í verandi lóg um arbeiðsloysisstrygging og arbeiðsávísing. Tað er tí tørvur á at áseta greiðari heimildir í lógini um hesi viðurskifti.

**Grundgevingar fyri arbeiðsmarknaðarátøkum**

Við arbeiðsmarknaðarátøk skal í hesum høpi skiljast virksemi, sum Arbeiðsloysisskipanin tekur stig til fyri at tryggja, at fólk, sum missa arbeiði, ikki flyta seg longri frá arbeiðsmarknaðinum enn neyðugt og fyri at tryggja, at tey, sum missa arbeiði í minst møguligan mun verða ávirkað av neiligu árinunum av arbeiðsloysi.

Arbeiðsmarknaðarátøkini fevna m.a. um samrøður av ymsum sløgum og vavi, lønta og ólønta starvsvenjing, skráseting av førleikum, skriving av CV og umsóknum, profiltestir, skeið fyri lesi- og skriviveik, skeið fyri orðblind, skeið vend móti ávísum vinnugreinum (m.a. trygdarskeið, trukkkoyrikort), íverksetaramøguleikar, útbúgvingarmøguleikar av ymsum sløgum við lestrarvegleiðing, ymsar lærugreinar á fólkaskúlastigi á kvøldskúlum, samstarv við ymsar arbeiðsgevarar, virkisvitjanir, samstarv við Tekniska Skúla og samfelagsgagnligar verkætlanir av ymsum sløgum við støði í eitt nú Vakstrarhúsinum í Sandavági og nú Fjølsmiðjuni á Hjalla.

Síðani ALS var sett á stovn í 1992 eru hendar stórar broytingar í samfelagnum, og arbeiðsloysið er ein veruleiki, sum kann raka øll. Í stóru kreppuni í nítiárunum var fokus á útgjaldspartin, og avbjóðingin var í stóran mun at tryggja fíggjarliga máttin og gjaldførið hjá ALS. Tað varð tá ikki lagdur serliga stórur dentur á avleiðingarnar, sum arbeiðsloysi hevur á tilveruna hjá einstaka menniskjanum, men tað broyttist við búskaparkreppuni í 2010, tá ALS gjørdist meiri tilvitað um neiligu avleiðingarnar, arbeiðloysi kann hava við sær.

Í 2009 varð útgjaldið broytt til eitt søguliga høgt støði. Sambært lógarviðmerkingunum vóru tær lógarbroytingarnar úrslit av tilvitaðum politikki at tryggja arbeiðsleysum fíggjarligt fótafesti og við eini kappingarførari føroyskari arbeiðsloysisskipan at forða fyri, at fólk fluttu av landinum.

Í tíðarskeiðinum síðani 2009, sum m.a. er eyðkent av vaksandi arbeiðsloysi – og serliga við støðuni, tá størsta vinnufyritøka í landinum, Faroe Seafood, fór av knóranum í desember mánað í 2010, eru væntanirnar og í ávísan mun eisini krøvini til Arbeiðsloysisskipanina broytt. Ásannandi stóra týdningin, ið arbeiðsloysi hevur fyri bæði tann einstaka og eisini fyri samfelagið

yvirhøvur, er tað meiri ein sjálvfylgja nú enn áður, at ALS hevur ein virknan leiklut við ymsum arbeiðsmarknaðarátøkum.

Arbeiðsloysisskipanin er ein tann mest týðandi leikarin, tá tað snýr seg um at fáa fólk út aftur á arbeiðsmarknaðinum, og amboðini eru at finna í arbeiðsmarknaðarátøkunum.

Arbeiðsloysisskipanin eggjar arbeiðstakarum at vera verandi í arbeiði, til teir hava funnið nýtt arbeiði. Tað er ein treyt, at arbeiðstøk virkin leita sær eftir nýggjum arbeiði og taka av tilboðum um arbeiði. Arbeiðsloysisskipanin krevur eisini, at arbeiðstøk taka lut í ymsum tiltøkum og ymsum arbeiðsmarknaðarátøkum, tá arbeiðsloysið hevur staðið við eina tíð.

Ásetingarnar um virknan leiklut byggja á somu meginreglur um ein virknan arbeiðsmarknaðar-politikk, sum fleiri av okkara grannalondum nýta. Tað merkir, at saman við rættindunum til eitt nú útgjald fylgja eisini skyldur til millum annað, at virkin søkja starv og at taka av øllum arbeiði, ið einum stendur í boði, umframt at taka lut í arbeiðsmarknaðarátøkum.

Eitt av málunum við hesum lógaruppskoti er at fyribyrgja og minka um skaðaárinini, sum arbeiðsloysið hevur fyri bæði tann einstaka og fyri samfelagið yvirhøvur. Gransking innan økið vísir greitt, at tað eru týðandi neilig árin fyri tann einstaka at vera arbeiðsleysur, og hesi árin versna, jú longri fólk eru arbeiðsleys. Kanningar, sum ALS hevur gjørt millum viðskiftafólkini, staðfesta somuleiðis, at jú longri ein persónur er arbeiðsleysur, tess meiri fánar viðkomandi, og størri er vandin fyri, at vónloysi setir inn.

At gerast arbeiðsleysur er ein sosial hending, sum hevur stóra ávirkan á tann, tað rakar. Leikluturin hjá ALS er í fyrstu syftu at tryggja teimum, sum missa arbeiði, tann arbeiðsloysisstuðul, tey hava rætt til, skjótast gjørligt.

Tað gongur ikki long tíð, so koma sosialu førleikarnir undir trýst, og seinni er vandi fyri, at arbeiðsloysið eisini fer at ávirka fakligu førleikarnar. Tí er umráðandi, at ALS sum skjótast megnar at halda viðskiftafólkunum til og stuðlar undir, at fólk leita sær nýtt arbeiði, og at ymsu førleikarnir verða hildnir viðlíka, til farið verður til arbeiðis aftur. Eitt amboð til tað er at hava fyrstu samrøðuna við viðskiftafólkini alt fyri eitt, tey koma inn í skipanina. Longu í sambandi við viðgerð av umsókn um arbeiðsloysisstuðul, og síðani aftur áðrenn avleiðingarnar av arbeiðsloysi gerast álvarsamar.

Royndirnar hjá ALS higartil av handfaringini av avbjóðingunum, sum arbeiðsloysi hevur við sær fyri tann einstaka, eru, at tilgongdin eigur at hava støði í tí einstaka persóninum. Tað at hava eitt arbeiði, hevur stóran týdning í tilveruni og gerandisdegnum hjá teimum allarflestu, og arbeiði hevur stóran týdning fyri eitt nú sjálvsvirðingina og vælveruna.

Fólk hava ymsar eginleikar, ymsar førleikar og ymsar persónsmenskur, og tey hava eisini ymisk ynskir um framtíðarstarv. Hesi viðurskifti er neyðugt hjá ALS at taka atlit til, og tí er umráðandi, at neyðugar heimildir og reglur eru tøkar, og at tað verður fyrisitið í mun til reglurnar.

Atlitið til tann einstaka merkir eisini, at ábyrgdin fyri at koma aftur í arbeiði, liggur hjá tí einstaka og ikki hjá eini skipan. Tað er tann einstaki, sum hevur eina natúrliga motivatión fyri at koma sær úr arbeiðsloysi og aftur í arbeiði.

Tað, at arbeiðið hjá ALS, í mun til at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði, hevur støði í fyritreytunum og tørvinum hjá tí einstaka persóninum ger, at tilboðini um

arbeiðmarknaðarátøk ikki eru tey somu til øll, men í breiðari merking fevna um átøk sum tey, ið eru nevnd í allýsingini av arbeiðsmarknaðátøkum omanfyri, og sum eru málrættaði tí einstaka.

Málið við øllum arbeiðsmarknaátøkum er at fáa tann einstaka nærri at arbeiðsmarknaðinum aftur, og fyri at tað skal eydnast til fulnar, er neyðugt at seta tí einstaka krav um virkna luttøku í hesum átøkum. Royndirnar vísa, at verða krøv ikki sett, kann tað vera ein avbjóðing at fáa nøktandi samstarv í lag og at røkka settum málum.

Fyri at ALS skal veita arbeiðsgevarum eina góða og nøktandi tænastu – og finna teimum skikkað starvsfólk - er neyðugt at hava góða vitan um førleikarnar hjá hvørjum einstakum í skipanini. Fyri tann einstaka hevur tað týdning at verða møttur og sæddur fyri tað, ein er. Í møtinum millum ALS og tann einstaka verður skipað eitt umhvørvi, so at viðkomandi rúmast, búnast og kann fara væl um allar sínar førleikar og viðlíkahalda og menna teir, meðan viðkomandi einki arbeiði hevur.

Endamálið við at seta krøv um virkna luttøku í arbeiðsmarknaðarátøkum er at skapa grundarlag fyri, at fólk fáa møguleika fyri at koma skjótari í arbeiði og at forða fyri, at fólk fáa varandi mein orsaka av arbeiðsloysi.

## 2. Høvuðsinnihaldið í uppskotinum

### Hækkan av inngjaldslofti

Inngjaldsloftið verður hækkað til kr. 650.000.-, sum eisini var markið áðrenn lógarbroytingarnar í 2012.

Við støði í lønarútgjaldingunum í 2013 verður mett, at hendan broytingin fer at hava eina meirinntøku á uml. 2,2 mió. kr. við sær.

### Bíðidagar

Eftir uppskotinum, sum varð lagt fyri tingið í heyst, løgtingsmál nr. 36/2014, vóru bíðidagar tengdir at inntøku. Sambært galdandi reglum fáa øll 10 bíðidagar, men eftir tí broytingingini vórðu bíðidagarnir lækkaðir niður í tveir fyri inntøkur upp til kr. 250.000. Bíðidagarnir skuldu síðani hækka við tveimum bíðidøgum fyri hvørjar kr. 100.000.-, útrokningargrundarlagið hækkar. Tó til í mesta lagi 10 bíðidagar.

Spurningurin um bíðidagar er síðani viðgjørdur aftur, og tikið verður ikki undir við tilmælinum frá Stýrinum fyri ALS um at differientera bíðdager eftir inntøku.

Bíðidagar eiga fyrst og fremst at verða ásettir eftir, hvussu ein vælvirkandi arbeiðsmarknaður eigur at regulerast.

Bíðidagar kunnu verða ein háttur, at skapa áeggjan til at varðveita og søkja arbeiði. Mett verður, at bíðidagar, sum Stýrið fyri ALS hevur skotið upp, ikki skapa somu áeggjan, sum galdandi reglur.

ALS er ein generel skipan og reglurnar um inn- og útgjald, bíðidagar o.a. eiga í mest møguligan mun at vera eins fyri øll arbeiðsleys. Umframt frammanfyri nevnda er tað tí ein spurningur, um tað er rímiligt, at tað í ALS- lógini, verður ásett, at tað fyri tey, sum frammanundan lutfalsliga verða minst kompenserað við arbeisloysisstuðlinum, skulu galda øðrvísi og meira tyngjandi reglur.

ALS- lógin eigur tí ikki at verða broytt soleiðis, at bíðidagar verða differienteraðir eftir inntøku, uttan at hetta er nærri viðgjørt og grundgivið.

Eftir hesum uppskotinum verður vent aftur til galdandi reglur soleiðis, at øll fáa 10 bíðidagar, við tí broyting, at persónar, sum mynstra við skipum, har mynstringin er styttri enn ein mánað, fáa ikki bíðidagar við nýggju reglunum. Hetta fer væntandi at gera tað lættari hjá skipum at fáa manning.

Styrið fyri ALS mælir, sum nevnt, til bíðidagar samsvarandi uppskotinum um biðidagar, sum varð lagt fyri tingið í heyst, løgtingsmál nr. 36/2014, og hevur hesar grundgevingar:

” Hinvegin metir stýrið framvegis, at rætta broytingin í mun til bíðidagar er, at bíðidagar verða tengdir at inntøku. Hendan skipanin er ikki nýggj. Bíðidagar vóru longu í upprunalógini í 1992, og í 1997 fram til 2009 vóru bíðidagarnir tengdir at inntøku. Stýrið metir, at hetta er rætta loysnin, sum best verjir skipanina móti misnýtslu og sum samstundis tryggjar ein ávísan smidleika á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hesin leisturin kemur teimum við lægstu inntøkunum til góðar, meðan hon eisini virkar sum ein forðing fyri møguligari misnýtslu.

ALS-skipanin er fødd við bíðidøgum. Frá byrjan í 1992 fingu tímalønt 1 bíðidag, fastlønt og sjálvstøðug vinnurekandi 4 bíðidagar, tey í fiskavirkisskipanini ein bíðidag og serligar reglur vóru um bíðidagar fyri útróðrar- og fiskimenn.

Í lógarbroytingini í 1997 vóru bíðidagarnir broyttir soleiðis, at teir vóru tengdir at inntøkuni seinastu 6 mánaðirnar undan arbeiðsloysinum. Ásetast kundu ikki fleiri enn 10 bíðidagar. Grundgevingin fyri at broyta bíðadagarnar var:” Í samband við bíðidagar eru arbeiðsleys ikki býtt upp í fleiri bólkar, men í hesum uppskoti eru bíðidagarnir bert knýttir at inntøkuni áðrenn arbeiðsloysi. Hetta ger tað umsitingarliga lættari at áseta bíðidagar.”

Bíðidagarnir vórðu tiknir við aftur í lógina í 2012 við atliti til at betra um fíggjarligu fyri-treytirnar hjá Arbeiðsloysisskipanini. Búskaparliga gongdin er nú broytt, og útlitini fyri at fáa arbeiði eru batnað. Tí er neyðugt at tryggja, at tað enn betri loysir seg at arbeiða enn at vera í ALS.

Sambært royndunum hjá ALS hava bíðidagarnir havt við sær, at fólk í summum førum aftra seg við at taka av arbeiði av meira óstøðugum slagi ella í styttri tíðarskeið, tí fara fólk úr skipanini í hesi størv, kunnu tey missa rættin til arbeiðsloysisstuðul og so fáa 10 bíði¬¬dagar, tá tey koma inn aftur í skipanina. Tað svarar til tvær vikulønir, og tað er ein ov tung fíggjarlig byrða hjá fleiri.

Galdandi reglur áseta, at fólk kunnu arbeiða í styttri tíðarskeið, meðan tey eru í ALS, um talan er um fyrifallandi arbeiði. Bíðidagarnir gera, at fólk í summum førum aftra seg við at taka av øllum tí arbeiði, teimum stendur í boði. Ætlanin við uppskotinum er í enn størri mun at eggja fólki til at taka av øllum arbeiði, teimum stendur í boði, uttan at hugsa um ALS og avleiðingar av bíðidøgum.”

**Karantena**
Sambært galdandi reglum fáa tey, sum siga seg úr starvi uttan haldgóða grund, og tey, sum verða burturvíst orsakað av tænastubroti, karantenu í fýra vikur. Henda áseting verður eftir uppskotinum herd, soleiðis at karantenan fer upp í 8 vikur.

Við støði í tølum fyri 2013 verður mett, at hendan broytingin fer at merkja eina sparing á uml. 3,2 mió. kr.

**ALS farloyvi**
Í november 1994 varð heimild sett í ALS-lógina til, at fólk í føstum starvi kundu fara í farloyvi, so at arbeiðsleys kundu setast í starv. Tann, sum fer úr starvinum í ALS-farloyvi, fær arbeiðsloysisstuðul, meðan ein arbeiðstøkur fer í viðkomandi starv. Henda skipan varð sett í verk í fíggjarliga trongum tíðum við stórum arbeiðsloysi, og tørvur var á skipanum, sum kundu geva fólki ítøkiligar og virðismiklar arbeiðsroyndir.

Tað er framvegis tørvur á virðismiklum arbeiðsroyndum, men sum støðan er nú við einum arbeiðsloysi, sum er áleið 3%, er minni tørvur á skipanini við ALS-farloyvi.

Skotið verður tí upp, at skipanin verður broytt soleiðis, at hon bert verður nýtt, tá arbeiðsloysið er omanfyri 6%.

Arbeiðsloysið er í løtuni um 3,2%, og skipanin verður tí eftir uppskotinum ikki nýtt, men kann setast í verk, um arbeiðsloysið aftur hækkar. Við støði í nýtsluni av ALS-farloyvum í 2014 verður mett, at hendan broytingin fer at spara ALS áleið 3,3 mió. krónur í minni útgjøldum.

**Dagatalið**
Sambært galdandi reglum fellur rætturin til útgjald burtur, tá ið ein hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 648 dagar í undanfarna trý ára skeiði.

Arbeiðsloysisskipanin var upprunaliga ætlað at tryggja fólki, sum mistu arbeiði, eina rímiliga inntøku eitt styttri tíðarskeið. Tað var ikki ætlanin, at fólk skuldu fáa útgjald úr skipanini í longri tíð.

Royndirnar vísa, at tað eru fleiri fólk, sum av ymsum orsøkum eru leingi í skipanini, og dømi eru um, at fólk hava verið knýtt at skipanini í omanfyri fýra ár. Tað er ikki í tráð við andan og endamálið við skipanini. Tað, at fólk kunnu vera so leingi í skipanini, merkir eisini, at samlaða útgjaldið til hesi fólkini verður lutfalsliga høgt og er við til at tyngja skipanina búskaparliga.

Sum ein liður at fáa skipanina aftur á beint, verður skotið upp, at tíðarskeiðið, sum fólk kunnu koma upp á fult dagatal, verður longt úr trimum árum upp í fýra ár.

Við støði í tølum frá 2013 verður mett, at sparingin við at broyta hesa áseting verður 8 – 8,5 mió. kr.

**Arbeiðsmarknaðarátøk**
Í verandi lóg verður nýtt hugtakið førleikagevandi tiltøk, sum m.a. fevnir um arbeiðsvenjing. Eftir uppskotinum verður nýtt hugtakið arbeiðsmarknaðarátøk, sum skal skiljast í breiðari merking. Hetta eru átøk, sum ALS skipar fyri til tess betri at tryggja, at fólk, sum missa arbeiði, ikki flyta seg frá arbeiðsmarknaðinum og fyri at virka fyri, at arbeiðstøk ikki fáa mein av neiligu árinunum av arbeiðsloysi.

Persóni, sum er arbeiðstøkur, kann verða álagt at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum. Nærri reglur um hetta verða ásettar í kunngerð, heruppií reglur um innihald, persónskara, skipan av átøkunum, nær og undir hvørjum treytum ein persónur skal luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkunum o.a.

Við hesum verður útvegað greið lógarheimild fyri at áleggja arbeiðsleysum skyldu at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, og at áleggja karensdagar, um skyldan ikki verður hildin.

Samlaðu útreiðslurnar, sum ALS hevur í dag av førleikagevandi tiltøkum - nú arbeiðsmarknaðarátøkum – (tey eru starvsvening, førleikamenning og ALS-farloyvi), eru slakar 23 mió. kr. í beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslum.

Av tí at tað eisini her eru so nógvir ókendir faktorar, ber ikki til at seta neyva krónuupphædd á sparingina við hesum tiltøkum, men hvønn dag eitt viðskiftafólk hjá Arbeiðsloysisskipanini fer fyrr aftur til arbeiðis, sparir ALS millum 550 og 600 krónur í miðal.

**3. Ummæli**

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar avleiðingar**

**A. Fyri landið/landsstýrið**

Tað, at tíðarskeiðið, har fólk kunnu koma upp á fult dagatal (648 dagar), verður longt úr trimum upp í fýra ár, hevur við sær, at fleiri fólk fara úr skipanini, og at nøkur teirra fara at fáa forsorg vegna arbeiðsloysið ella aðra veiting frá Almannaverkinum.

Við ymsum fyritreytum er Almannaverkið komið fram til, at hendan broytingin kann fara at hava við sær, at meirútreiðslan hjá Almannaverkinum til arbeiðsloysisforsorg verður áleið 2,2 mió. krónur hægri árliga.

**B. Fyri ALS**

Tiltøkini hava við sær sparingar fyri ALS upp á uml.14,5 – 15 mió kr. og meirinntøkur upp á uml. 2,2 mió. kr.

Hesar upphæddir hava støði í simuleringum, sum eru gjørdar fyri 2013, tó hava upphæddirnar fyri ALS-farloyvi støði í 2014.

**C. Fyri kommunurnar**

a. Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

**D. Fyri vinnuna**

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna, men broytingarnar í í heimildunum at skipa fyri arbeiðsmarknaðarátøkum fara sannlíkt at gera tað lættari hjá vinnuni at fáa fólk, og broytingin at eingir bíðidagar longur vera hjá teimum, sum mynstra við skipi, fer sannlíkt at gera tað lættari hjá skipum at fáa føroyska manning.

**2. Umsitingarligar avleiðingar**

Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

**3. Umhvørvisavleiðingar**

a. Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur sosialar avleiðingar við tað, at karenstíðin verður longd, og leingjanin av undanfarna skeiði úr trimum upp í fýra ár sannlíkt hevur við sær, at fleiri fólk enn annars fara úr skipanini, og at nøkur teirra fara at fáa forsorg vegna arbeiðsloysi ella aðra veiting frá Almanna-verkinum. Hinvegin verður eisini mett, at broytingarnar samanumtikið fara at stimbra hugin og møguleikarnar hjá fólki at koma í arbeiði.

Uppskotið fer væntandi eisini at hava sosialar avleiðingar, tí broytingin í viðurskiftunum um virkna luttøku í arbeiðsmarknaðarátøkum fer at hava við sær, at neiligu árinini av arbeiðsloysi verða meiri avmarkað, enn tey eru nú. Arbeiðsmarknaðarátøkini fara sannlíkt eisini at hava við sær, at færri fólk – alt annað óbroytt - fara at detta úr Arbeiðsloysisskipanini yvir á eitt nú Almannaverkið.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landskassan/ landsstýrið | Fyri ALS | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**

Til nr. 1
Við lógarbroytingini í 2012 varð ALS gjaldið hækkað úr 1% upp í 1,25%. Broytingin hevði við sær, at ALS- gjaldið varð goldið av inntøkum upp til kr. 520.000 í staðin fyri kr. 650.000, sum var inngjaldshámarkið áðrenn broytingina.

Við hesi ásetingini í uppskotinum verður tryggjað, at ALS-gjaldið aftur verður goldið av inntøkum upp til kr. 650.000 í mun til galdandi inngjaldsprosentið.

Til nr. 2,
Í § 14 í galdandi lóg eru grundleggjandi treytirnar fyri at fáa rætt til arbeiðsloysistuðul ásettar:
Í § 14, stk. 1, nr. 1-5, er ásett, at rætt til arbeiðsloysisstuðul hevur persónur frá tí degi, tá viðkomandi:

1) er arbeiðsleysur og mótvegis Arbeiðsloysisskipanini prógvar, at so er, tó í fyrsta lagi frá tí degi Arbeiðsloysisskipanin hevur móttikið skrivliga umsókn,
2) er tøkur á arbeiðsmarknaðinum og arbeiðsførur at átaka sær eitt og hvørt fulltíðarstarv,
3) hevur fylt 16 ár, men ikki 67 ár,
4) hevur bústað í Føroyum og
5) ikki er sjálvstøðugt vinnurekandi sambært § 12, stk. 6.

Eftir stk. 4 kann ásetast í kunngerð nærri reglur um, nær ein persónur er arbeiðsleysur, er tøkur, nær hann er arbeiðsførur o. l.

Eftir uppskotinum verður sett afturat sum nr. 6) "er sinnaður at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, sbr. §§ 25 – 25 b".

Við hesi áseting verður tað ásett í lógini, at tað er ein treyt fyri at fáa rætt til arbeiðsloysistuðul, at viðkomandi er sinnaður at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum. Tilvísingin til §§ 25- 25 b, merkir, at hetta bert er ein treyt, um tiltøkini eru áløgd sbrt. reglunum í § 25 – 25 b.

Til nr. 3
Víst verður til almennu viðmerkingirnar
ALS-skipanin er fødd við bíðidøgum. Frá byrjan í 1992 fingu tímalønt 1 bíðidag, fastlønt og  sjálvstøðug vinnurekandi 4 bíðidagar, tey í fiskavirkisskipanini ein bíðidag og serligar reglur vóru um bíðidagar fyri útróðrar- og fiskimenn.

Í lógarbroytingini í 1997 vóru bíðidagarnir broyttir soleiðis, at teir vóru tengdir at inntøkuni seinastu 6 mánaðirnar undan arbeiðsloysinum. Ásetast kundu ikki fleiri enn 10 bíðidagar. Grundgevingin fyri at broyta bíðadagarnar var*:" Í samband við bíðidagar eru arbeiðsleys ikki býtt upp í fleiri bólkar, men í hesum uppskoti eru bíðidagarnir bert knýttir at inntøkuni áðrenn arbeiðsloysi. Hetta ger tað umsitingarliga lættari at áseta bíðidagar."*

Bíðidagarnir vórðu tiknir við aftur í lógina í 2012 við atliti til at betra um fíggjarligu fyritreytirnar hjá Arbeiðsloysisskipanini. Búskaparliga gongdin er nú broytt, og útlitini fyri at fáa arbeiði eru batnað. Tí er neyðugt at tryggja, at tað enn betri loysir seg at arbeiða enn at vera í ALS.

Sambært royndunum hjá ALS hava bíðidagarnir havt við sær, at fólk í summum førum aftra seg við at taka av arbeiði av meira óstøðugum slagi ella í styttri tíðarskeið, tí fara fólk úr skipanini í hesi størv, kunnu tey missa rættin til arbeiðsloysisstuðul og so fáa 10 bíðidagar, tá tey koma inn aftur í skipanina. Tað svarar til tvær vikulønir, og tað er ein ov tung fíggjarlig byrða hjá fleiri.

Galdandi reglur áseta, at fólk kunnu arbeiða í styttri tíðarskeið, meðan tey eru í ALS, um talan er um fyrifallandi arbeiði. Bíðidagarnir gera, at fólk í summum førum aftra seg við at

taka av øllum tí arbeiði, teimum stendur í boði. Ætlanin við uppskotinum er í enn størri mun at eggja fólki til at taka av øllum arbeiði, teimum stendur í boði, uttan at hugsa um ALS og avleiðingar av bíðidøgum.

Heimild er at seta nærri reglur í kunngerð um, nær og hvussu bíðidagar verða ásettir.

Eftir uppskotinum til nýtt stk 2 í § 16 a fáa persónar, sum mynstra við skipum, har mynstringin er styttri enn ein mánað, ikki bíðidagar við nýggju reglunum. Hetta fer væntandi at gera tað lættari hjá skipum at fáa manning.

Til nr. 4
Eftir galdandi reglum (§ 18 í ALS-lógini) missir arbeiðsleysur, sum er burturvístur orsakað av tænastubroti, rættin til stuðul í 4 vikur at rokna frá tí degi, setanarliga tilknýti hansara til arbeiðsgevaran er av. Sama er galdandi, um so er, at hin arbeiðsleysi uttan haldgóða grund hevur sagt seg úr starvi.

Um tað er haldgóð grund, verður avgjørt eftir ítøkiligari meting hjá ALS. Haldgóð grund kann t.d. vera, at arbeiðsgevari ikki heldur gjørdar avtalur ella grovliga ger brot á eitt nú arbeiðsumhvørvisreglur.

Við herðingini av karantenu frá fýra upp í átta vikur verður ein greiðari boðskapur sendur um, at fólk ikki uttan haldgóða orsøk skulu siga seg úr starvi fyri at koma inn í skipanina. Tað hevur eina fíggjarliga byrðu fyri ALS við sær, umframt at fólk tá kunnu koma í vanda fyri at gerast langtíðararbeiðsleys. Heldur eiga fólk at royna at vera verandi í sínum starvi og royna at fáa ávirkan á umstøðurnar í starvinum. Eydnast tað ikki, mugu fólk royna at finna sær eitt nýtt starv, meðan tey eru í starvi, og soleiðis fara úr einum starvi beint í annað starv uttan at nýta ALS sum millumlið.

Royndir vísa eisini, at tað er lættari at finna nýtt arbeiði hjá einum, sum framvegis er á arbeiðsmarknaðinum í mun til ein, ið er farin av arbeiðsmarknaðinum og í arbeiðsloysi.

Ein persónur, sum er vorðin arbeiðsleysur orsaka av at hava sagt seg úr starvi, skal lýsa umstøðurnar nærri í sambandi við uppsøgnina og grundgeva fyri, at talan var um haldgóða orsøk fyri at hava sagt seg úr starvi.

Dømi um slíkar umstøður eru:

- vánaligt arbeiðsumhvørvi, ið er íkomið grundað á, at arbeiðsgevarin er farin út um leiðslurætt sín, ella at talan er um, at fysisku karmarnir fyri arbeiðinum, t.d. sjálvt arbeiðsplássið, er heilsuskaðiligt
- likamlig ella sálarlig sjúka, ið verður váttað við læknaváttan
- vantandi lønarútgjalding. Vanliga verður kravt, at seinkingin er uppá umleið eina viku, og at arbeiðstakarin hevur gjørt arbeiðsgevaran kunnugan um seinkingina. Hetta eigur at verða gjørt skrivliga
- avgerandi broytingar í setanartreytunum sum t.d.
- broyta lønina
- seta arbeiðstíðina niður móti at minka lønina
- broyta akkordtreytir til skaða fyri arbeiðstakaran
- krevja at arbeiðið verður munandi meira ábyrgdarfult ella umfatandi. Hann kann tó í styttri tíðarskeið krevja, at arbeiðstakarin átekur sær størri arbeiðsskyldur

- áleggja arbeiðstakaranum slíkar broytingar, at arbeiðið reelt verður eitt annað
- broyta starvsheitið hjá viðkomandi munandi ella í stóran mun at taka heimildirnar frá viðkomandi
- flyta arbeiðsplássið, so útreiðslurnar og tíðarnýtslan at koma til og frá arbeiði vaksa munandi

Høvuðsreglan er, at arbeiðstakarin hevur givið arbeiðsgevara sínum eina skri**v**liga ávaring um broyttu viðurskiftini, fyri at talan kann verða um uppsøgn við haldgóðari grund.

Til nr. 5
Í § 19 í galdandi lóg er ásett, at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk noktar at taka á seg arbeiði, ávíst av arbeiðsávísingini, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul. Fyrstu ferð tann arbeiðsleysi noktar, missir hann rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur, aðru ferð í 8 vikur, triðju ferð í 12 vikur og fjórðu ferð í 6 mánaðir. Ásetast kunnu í kunngerð nærri reglur um, nær talan er um serliga orsøk o.l.

Eftir uppskotinum missir arbeiðsleysur eisini rættin til arbeiðsloysisstuðul í 4 vikur ávikavist 8 vikur, 12, vikur og 6 mánaðir, um viðkomandi uttan serliga orsøk noktar at luttaka í arbeiðsmarknaðarátaki.

Við hesi ásetingingini í uppskotinum verður tað greið heimild í lógini at taka avgerð um, at rættarliga fylgjan av at nokta at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum er, at viðkomandi missir arbeiðsloysisstuðulin í 4 vikur ávikavist 8 vikur, 12 vikur og 6 mánaðir.
Tilvísingin til §§ 25- 25 b, merkir, at treytin fyri at taka avgerð um, at noktan skal hava nevndu avleiðingar, er, at tiltøkini eru áløgd sbrt reglunum í § 25 – 25 b.

Til nr. 6.
Í galdandi § 19 a, stk. 2, er ásett, at arbeiðsleysur, sum uttan serliga orsøk aðru ferð ikki møtir upp til skeiðstilboð, sum viðkomandi hevur fingið bjóðað frá Arbeiðsloysisskipanini og hevur tikið av, missir rættin til arbeiðsloysisstuðul í fýra vikur.

Skeiðstilboð er eftir uppskotinum arbeiðsmarknaðarátak, og tað eru eftir uppskotinum settar reglur um skyldu at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum, og um fylgjurnar av ikki at halda skyldurnar. Hesar reglur eru felags fyri øll arbeismarknaðarátøk, heruppií skeiðstilboð, og tí verða serligu reglurnar í § 19 a, stk 2, strikaðar.

Til nr. 7.
Eftir § 21 í lógini er heimild til í kunngerð at seta nærri reglur um eina farloyvisskipan. Ein tílík skipan skal eftir § 21 innihalda reglur um útgjaldingar til fólk í farloyvi frá føstum ella støðugum starvi, herundir at útgjaldið kann vera lægri, enn ásett í § 15 og § 16 í lógini, hvørjar treytir skulu setast tí, ið fer í farloyvi, og tí arbeiðsleysa, m.a. hvussu tann, ið fer í farloyvi, skal skrásetast í arbeiðsávísingini, hvussu leingi hin arbeiðsleysi skal hava fingið stuðul, umframt nærri reglur um, nær talan er um fast ella støðugt starv, o. l.

Útgjald undir farloyvi kann verða givið fyri eitt ávíst tíðarskeið millum 3 og 12 mánaðir.

Útgjald undir farloyvi skal verða givið við teirri treyt, at annað fólk, sum fær arbeiðsloysisstuðul og er tøkt í arbeiðsávísingini, verður sett í staðin í sama tíðarskeiði og í høvuðsheitum undir somu treytum.

Sum nevnt í almennu viðmerkingunum, varð skipanin sett í verk í fíggjarliga trongum tíðum við stórum arbeiðsloysi, og tørvur var á skipanum, sum kundu geva fólki ítøkiligar og virðismiklar arbeiðsroyndir.

Tað er framvegis tørvur á virðismiklum arbeiðsroyndum, men sum støðan er nú við einum arbeiðsloysi, sum er áleið 3,2%, er minni tørvur á skipanini við farloyvi.

Skotið verður tí upp, at skipanin verður broytt soleiðis, at hon bert verður nýtt, tá arbeisloysið er omanfyri 6%.

Til nr. 8
Eftir galdandi reglum fellur rætturin til útgjald burtur, tá arbeiðsleysur í undanfarna 3-ára skeiði hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 648 dagar.

Tá rætturin til útgjald er fallin burtur, hevur hin arbeiðsleysi ikki rætt at fáa útgjald úr skipanini, fyrr enn eitt 24-mánaða skeið er farið, og verður tá at meta sum um hann kemur upp í skipanina fyrstu ferð.

Rætturin at fáa útgjald í 648 dagar verður ikki skerdur við hesi lógarbroyting, men grundarlagið undir uppteljingini av útgjaldsdøgum verður longt úr trimum til fýra ár. Royndirnar vísa, at henda áseting í nógvum førum ikki hevur virkað samsvarandi innihaldinum, tí tey, sum eru í skipanini, av ymsum grundum innanfyri eitt 3 ára skeið í styttri tíð ikki hava fingið útgjald, og tí verða verandi í skipanini í fleiri ár.

648 dagar svarar til 2 ½ ár. Við uppgerðini av, hvørt arbeiðsleysur hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 648 dagar, roknar skipanin við hvørja útgjalding 3 ár aftureftir. Við at leingja undanfarna skeiðið, verða fleiri útgjaldsdagar, sum skulu roknast upp í uppgerðina, og alt annað óbroytt verður tað tí skjótari at koma upp á teir 648 dagarnar.

Til nr. 9.

Við tað at allar ásetingar um tiltøk verða savnaðar í kapittul 6, og við tað at skotið verður upp at nýta heitið “arbeiðsmarknaðarátak” um hesi tiltøk, verður skotið upp, at yvirskriftin áðrenn § 24 “Kapittul 6 Arbeiðsávísing og arbeiðsskapandi tiltøk” verður broytt til: “Kapittul 6 Arbeiðsávísing og arbeiðsmarknaðarátøk.”

Til nr. 10 og 11

Løgtingslógin um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing er í stóran mun ein heimildarlóg, sum ásetir yvirskipaðu rammurnar fyri ALS, um m.a. leiðslu-, fíggjar, -roknskaparviðurskifti, um inn- og útgjald, um treytir fyri útgjaldi, um arbeiðsávísing og førleikagevandi tiltøk, meðan tað í lógini verður heimilað fyrisitingarliga at áseta nærri reglur viðvíkjandi nevndu viðurskiftum.

Longu í 1993 (løgtingsmál nr 186/1992 ) varð fyrsta heimildin sett í lógina, sum ásetir møguleikar hjá arbeiðsleysum at taka upp arbeiði (fyrifallandi) ella útbúgvingarskeið undir arbeiðsloysi. Í viðmerkingunum framgongur m.a. “at talan er um eina nýggja áseting um aktivering av arbeiðstøkum, sum í styttri tíðarskeið við loyvi frá stýrinum kunnu taka upp arbeiði og fáa arbeiðsloysisstuðul fyri hetta. Skotið verður upp, at stýrið ásetir nærri reglur

um longdina á tíðarskeiðnum, slag av arbeiði og treytir annars. Viðvíkjandi útbúgvingarskeiðnum skal talan vera um stutt skeið, har útbúgvingarstuðul annars ikki kann verða latin, og skal tann arbeiðsleysi gevast við skeiðnum, um hann fær tilboð um arbeiði."

Í november 1994 (løgtingsmál nr. 47/1994) vóru fleiri heimildir settar í lógina. Heimild varð at rinda fíggjarligan stuðul til ferðakostnað til størv ávíst uttanlands, umframt at farloyvisskipanin varð veruleiki. Í báðum førum undir teirri fyritreyt, at nærri reglur vórðu ásettar av stýrinum í kunngerð.

Sum tað framgongur, skulu tiltøk og útreiðslur til tiltøk, sum ALS setir í verk, sostatt vera heimilað í lógini, sbr. eisini viðmerkingarnar til endamálsásetingina til § 1 í upprunalógini (1997 lógarbroytingin):

"Endamál Arbeiðsloysisskipansins er her lýst. Tað er ein stevna, sum ikki gevur heimild til útreiðslur ella tiltøk" (løgtingsmál nr. 99/1996: Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, Løgtingstíðindi 1996 s. 664)

Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing varð í § 26 (nú § 25) ein avmarkað heimild til í serligum førum at seta í verk og gjalda førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys.

Í viðmerkingunum til ásetingina í § 26 í uppskotinum til høvuðslógina, løgtingsmál nr. 99/1996: Uppskot til løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, Løgtingstíðindi 1996 s. 668, varð sagt:

"Stýrið kann í serligum førum seta í verk og gjalda førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys. Hetta kann til dømis verða í sambandi við fyrireiking til eina komandi møguliga oljuvinnu."

Við løgtingslóg 79 frá 25. mai 2009 um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing vórðu heimildirmar at seta í verk førleikagevandi tiltøk fyri arbeiðsleys víðkaðar m.a. soleiðis, at skipanir við arbeiðsvenjingum hjá privatum og/ella almennum arbeiðsgevarum, har Arbeiðsloysisskipanin endurrindar arbeiðsgevaranum, kunnu setast í verk.

Eftir galdandi § 25 í lógini er sostatt heimild til, at ALS í serligum førum setir í verk førleikagevandi tiltøk, heruppií styttri skeiðstilboð, og serlig heimild er til lønta starvsvenjing og farloyvisskipan, og at ALS heldur útreiðslur til hesi tiltøk, men heimildin er ikki greið, um hesi tiltøk ikki eru sjálvboðin, men verða áløgd sum ein skylda.

Sostatt verður skotið upp, at § 25 í lógini verður orðað av nýggjum, har tað verður staðiliga ásett í stk. 1, at tað kann áleggjast arbeiðsleysum skylda virkin at luttaka í arbeiðs-marknaðarátøkum, sum nevnd eru í § 25, stk. 3 og 4 og § 25 a og § 25 b í lógini, og nærri reglur um hetta eru ásettar í kunngerð, sbr. tilvísingina í § 25, stk. 1 í uppskotinum til § 25, stk. 3 og 4 og §§ 25 a og 25 b í uppskotinum.

Við arbeiðsmarknaðarátøk skal í hesum høpi skiljast virksemi, sum Arbeiðsloysisskipanin tekur stig til fyri at tryggja, at fólk, sum missa arbeiði, ikki flyta seg longri frá arbeiðsmarknaðinum enn neyðugt og fyri at tryggja, at tey, sum missa arbeiði, minst møguligt verða ávirkað av neiligu árinunum av arbeiðsloysi.

Arbeiðsmarknaðarátøk, sum verða sett í verk, skulu styrkja og menna hin einstaka og økja um møguleikarnar fyri at koma aftur í arbeiði.

Tílík arbeiðsmarknaðarátøk kunnu m.a. vera starv eftir farloyvisskipanini eftir § 25 a í uppskotinum, lønt starvsvenjing eftir § 25 b í uppskotinum, sum í báðum førum eru kendar skipanir við nærri útgreinaðum reglum ásettar í kunngerð. § 25 a í uppskotinum samsvarar við ásetingarnar í galdandi § 21 um farloyvisskipan og § 25 b í uppskotinum samsvarar við ásetingarnar í galdandi § 25 um lønta starvsvenjing.

Tey arbeiðsmarknaðarátøk, sum ALS longu hevur sett í verk sum tilboð seinastu árini  fevna breitt. Alt frá samrøðum av ymsum sløgum , lønta og ólønta starvsvenjing, skráseting av førleikum, skeið í skriving av CV og umsóknum,  profilamboð, skeið fyri lesi- og skriviveik, skeið fyri orðblind, skeið vend móti ávísum vinnugreinum (m.a. trygdarskeið, trukk koyrikort), íverksetaramøguleikar, útbúgvingarmøguleikar við lestrarvegleiðing, ymsar lærugreinar á fólkaskúlastigi á kvøldskúla, samstarv við ymsar arbeiðsgevarar, virkisvitjanir, samstarv við kvøldskúlar og Tekniska Skúla og samfelagsgagnligar verkætlanir av ymsum sløgum við støði í eitt nú Vakstrarhúsinum í Sandavági og nú Fjølsmiðjuni á Hjalla.

Skulu tiltøk setast í verk, og skal tað kunna áleggjast skylda at luttaka, skulu nærri reglur um hesi tiltøk verða ásettar í kunngerð, sbr. § 25, stk. 3, heruppií reglur um innihald, persónskara, skipan av átøkunum, nær og undir hvørjum treytum ein persónur skal luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkunum o.a.

**Samrøður** verða skipaðar sum einstaklingasamrøður ella í bólkum, nýtsla av ymsum amboðum alt eftir tørvi, ynski, evnum og førleikum hjá tí einstaka. Samrøður (nevndar starvsprát) verða eisini nýtt í mun til ítøkiligar fyrispurningar frá arbeiðsgevarum ella eftirspurningi eftir arbeiðsmegi, har ávísir bólkar av fólkum verða bodnir inn eftir t.d. í mun til teirra royndir, útbúgvingar ella ynskir.

**Ólønt starvsvenjing** verður nýtt í ávísum førum fyri at kunna skapa samband til arbeiðsgevarar, so fólk sleppa at royna seg í arbeiði. Á henda hátt fær tann einstaki roynt seg, og arbeiðsgevarin mett um viðkomandi er tann rætti til starvið. Tað er óbindandi fyri báðar partar, og viðkomandi fær arbeiðsloysisstuðul í tíðarskeiðnum, sum er upp til 14 dagar.

**Skeiðini** umfatað bæði persónliga menning og fakrættaði skeið skipaði út frá einum tørvi hjá tí einstaka og eftirspurningi eftir førleikum á arbeiðsmarknaðinum. T.d. játtar ALS at gjalda fyri trygdarskeið, sum er fyritreyt fyri at kunna mynstra við skipi.

**Styttri førleikagevandi tiltøk** kunnu verða játtað, um (galdandi siðvenja) tey eru styttri enn 3 mánaðir, og ikki geva rætt til útbúgvingarstuðul. T.d. er 10. flokksundirvising sum dagskúlatilboð til vaksin uppá 3 mánaðir í  lærugreinunum føroyskt, enskt og støddfrøði skipað undir hesi heimild í samstarvi við Tórshavnar Kvøldsskúla og Mentamálaráðið. Eisini handverksskeið á Tekniska skúla í Tórshavn, sum gevur skjalfestar førleikar, umframt ein serlig verkætlan um førleikameting av fólki við royndum innan handverksvinnuna, eru fyriskipaði eftir hesi heimild.

**Samfelagsgagnligar verkætlanir** eru royndir við virkseminum í Vakstrarhúsinum í Sandavági og t.d. ullarverkætlanini, har tørvurin á at fólk sleppa at royna seg saman við øðrum í meiningsfullum og mennandi umhvørvi við verkætlanum, sum skapa eitt meirvirði fyri tann einstaka og samfelagi sum heild. T.d. verkætlanin við at byggja eitt spælipláss á Barnaheiminum

sum liður í einum timburskeiði og at velta epli eru dømi um verkætlanir, skipaði eftir hesum leisti. Ein styrki við hesum átøkum er at sambandi millum ALS og tann einstaka styrkist, og harvið økjast møguleikarnir hjá báðum at lyfta uppgávuna við at fáa fólk aftur í arbeiði.

Fjølsmiðjan á Hjalla er ítøkiligi karmurin um fleiri av hesum verkætlanum.

Í kunngerð verða nærri fyritreytir ásettar um, hvør persónskari verður innkallaður at luttaka í arbeiðsmarknaðarátøkum , innihaldið í arbeiðsmarknaðarátøkum (skipaði eftir tørvi og/ella eftirspurningi hjá tí einstaka í mun til eftirspurning og/ella tørv hjá vinnuni ella í mun til avbjóðingar hjá tí einstaka) og annars allar avgerandi og viðkomandi fyritreytir, sum skapa almenn fyrisitingarlig stevnumið, sum tryggja at útgangstøði verður tikið í tí einstaka persóninum .

**Til § 2**
Skotið verður upp, at ásetingarnar til broytingarnar í lógaruppskotinum fáa virknað frá 13. Juni 2015.

Eftir § 1, nr. 8 í uppskotinum verður § 22, stk. 1 broytt soleiðis, at upp- ella samanteljingartíðarskeiðið verður longt úr 3 upp í 4 ár, t.v.s., at rætturin til útgjald fellur burtur, tá arbeiðsleysur í einum 4-ára upp- ella samanteljingartíðarskeiði hevur fingið arbeiðsloysisstuðul útgoldnan í 648 dagar.

Fyri hvørt útgjaldsskeið (hvørjar 14 kalendaradagar) verður dagasaldan (talið á døgum viðkomandi hevur fingið útgjald í undanfarna upp- ella samanteljingartíðarskeiðinum) roknað av nýggjum. Dagasaldan kann í mesta lagi vera 648 dagar.

Úrslitið av at leingja undanfarna uppgerðarskeiðið úr 3 upp í 4 ár verður, at fleiri útgjaldsdagar telja við í dagasalduna. Hetta hevur við sær, at tað verða fleiri persónar enn nú, sum fara at røkka fullum dagatali, og sum tí detta út úr skipanini.

Fyri at sleppa undan, at tað henda ov brádligar og týðandi broytingar í viðurskiftunum hjá teimum, sum eru í skipanini, og sum eru um at detta úr skipanini, verður skotið upp, at broytingin verður gjøgnumførd í stigum yvir eitt ár.

Skotið verður tí upp, at undanfarna skeiðið verður longt við einum útgjaldsskeiði fyri hvørt útgjaldsskeið í eitt ár.

**Við støði í tølum fyri 2013 varð í uppskotinum roknað við, at leingjanin av undanfarna skeiðinum hevði við sær eina sparing upp á uml. 8 - 8,5 mió. kr. Við hesi broytingini verður sparingin í 2015 nakað minni, og verður mett, at sparingin í 2015 verður uml. 4-6 mió. kr.**

**Spm: Sørin – skal hetta ikki bara burtur nú, alt er skrivað saman í eitt lógaruppskot???**

***Johan Dahl***
landsstýrismaður

/Bjørgfríð Ludvig